# Blues gevur nógv til tónleik

Uni R. Debess er ein av teimum fýra tónleikarunum í Headache Blues Treo, sum var við í fyrsta innleiðandi umfarinum til Prix Føroyar. Uni er ein ungur evnaríkur tónleikari, sum spælir eitt slag av tónleiki, sum ikki er so nógv at hoyra til í Føroyum. Nevniliga blues.

Sjálvur spælir Uni gittar og var sangari. Hinir tríggir í bólkinum eruBúi Dam, Edvard Nyholm Debess og Rógvi á Rógvi.

Spurdur um hví hann valdi at spæla við hesum garvaðu góðu tónleikarunum innan føroyska tónleikaheimin, svarar Uni:

– Tað eru ikki nógvir ungir tónleikarar, sum spæla júst hetta slagi av tónleiki, og tí eri eg farin at spæla saman við teimum.

Orsøkina til, at hann fór at spæla blues, sigur Uni vera, at hann hevði roynt bæði klassiskt og rock áðrenn, men tað var ikki júst tað.

– Eg royndi síðani blues, og tað fall mær væl í hjartað, sigur Uni við einum smíli.

## Til Danmarkar

Um ikki so heilt langa tíð fer Uni til Danmarkar, har hann finna sær ein privatlærara og síðani fer at lesa tónleik.

– Eg fari at studera kenslurnar í tónleikinum. Blues gevur so nógv til tónleik. Tað er einkult, men í blues ræður tað um at finna tað stóra í tí lítla. Tað fer niður í dýbdina av tónleikinum, og harafturat er tað ikki so torskilt, greiðir Uni frá, sum heldur, at ein blues tónleikaheimur vantar í Føroyum.
Stak væl gekk eisini hjá Headache Blues Treo, sum hóast sín kanska ikki so prix-líknandi stíl, fekk eitt annað pláss í innleiðandi umfarinum, og harvið tryggjaði sær enn ein møguleika í at royna at sleppa við í Norðurlandahúsið tann 26. apríl.

– Umstøðurnar her eru ótrúliga góðar til at spæla. Tað er gott fyri tónleikin, at alt er á einum staðið, men um hini støðini fáa somu umstøðurnar, sum eru her, so skal prixið flytast útaftur kring landið, tí tað er avgjørt ein sjarma í at verða á teimum lokalu støðunum, sigur Uni um ljóðumstøðurnar í Mentanarhúsinum.

Av fyrstan tíð var tað als ikki ætlanin, at bólkurin skuldi fara við til Prix Føroyar, men tað var Búi Dam, sum kom við hugskotinum, at teir áttu at roynt.

Uni heldur, at tað gongur ikki út uppá at kappast innanfyri tónleik. Tað ræður um at framføra og at dáma at spæla.

– Ein kann ikki siga, hvat er best, tí øll hava sín máta at spæla uppá, men eg eri als ikki ímóti tí, men tað kann viðhvørt kanska gerast órættvíst, sigur Uni, sum millum annað hevur Jim Morrison og Jimi Hendrix sum fyrimyndir.

Umframt at spæla gittar og syngja, so er Uni eisini yrkjarin aftanfyri øll løgini, sum Headache Blues Treo spældi leygarkvøldið í Mentanarhúsinum.

– Eg fái íblástur allastaðni frá. Frá tí, sum eg geri, frá fólkunum eg tosi við og í tí eg síggi, sigur Uni at enda.


Búi Dam


Uni R. Debess



# PRIX


Rógvi á Rógvu


Flux

# Onki hat-trick til Flux

Ofta verður sagt, at tað kann kanska verða heldur hart at leggja fyri á eini konsert, tí áhoyrararnir ikki eru hitaðir rættiliga upp. Leygarkvøldið tá fyrsta innleiðandi umfarið í Prix Føroyar kappingini fór av bakkastokki, var tað Flux, sum hevði fingið hetta álitið litið upp í hendur. Teir vóru bólkurin, sum sendi Prix Føroyar 2003 út í luftina, og megnaðu teir hetta arbeiða serstakliga væl.

Showið var í topp. Bæði eldur og konfetti vóru ein partur av tí, og hóast hesa treku uppgávuna, so megnaðu teir væl at fáa áhoyrararnar í sín part ta løtuna framførslan varði.

Men tá alt kom til alt, var tað ikki Flux, sum fór avstað við steypinum hetta kvøldið. Tað var sum kunnugt MC-Hár. 2´arin hetta kvøldið slapp víðari í eitt umfar, har allir 2´ararnir skulu royna fyri seinastu ferð at sannføra dómararnar um, at teir eiga eitt pláss í sólini – í finaluni í Norðurlandahúsinum tann 26. apríl. Og tíverri fyri Flux, var tað Headache Blues Treo, sum streyk avstað við seinasta møguleikanum at sleppa ígjøgnum nálareygað hesuferð.

Tað hevur annars gingið væl hjá Flux í undanfarnu kappingum. Teir hava verið við tvær ferðir áður, og báðu ferðirnar hava teir ognað sær eitt pláss í finaluni. Men soleiðis skuldi tað ikki vera hesuferð.

– Nei, eg haldi ikki man kann siga, at vit eru vónbrotnir, sigur Kristian í Vági, bass-spælari í Flux.

– Eg rokni við, at hetta var eitt tað harðasta umfarið í kappingini, og vit høvdu væntað, at antin MC-Hár ella Headache Blues Treo sluppu víðari.

Sjálvir eru limirnir í Flux stak væl nøgdir við teirra egnu framførslu.

– Tað gekk væl at spæla, so tað kundi ikki verið betri. Eisini vóru rættiliga nógv fólk fyri at vera so tíðliga á kvøldi, men kanska vóru tey ikki líka væl við, sum tey vóru seinni.

Sjálvt um Flux ikki slapp í finaluna, so geva teir ikki upp fyri tað. Í nærmastu framtíð fara teir í upptøkuhølini, har teir fara at gera eina demo-upptøku, og síðani eru konsertir á skránni, bæði í Suðuroy og í badmintonhøllini.

– Vit royna bara at spæla so nógv sum møguligt, sigur bass-spælarin, sum leggur dent á, at sjálvt um finaluplássið ikki kom undir land hesuferð, so fer Flux ikki í ommu sína.

Myndir:

Stór mynd av Flux: Myndatxt: Flux

Myndatxt: Hans Marius Weihe Ziska